# Føroyingar við í uttanríkishøpi

**Fyri at styrkja um viðurskiftini í uttanlandsspurningum, ið hava við Føroyar at gera, hava uttanríkisráðharrin Niels Helveg Petersen og løgmaður Edmund Joensen gjørt av at seta eina seks mannaða nevnd á embætismannaðstøði.**

Beate L. Jensen

Beint fyri døgverða í gjár fór uttanríkisráðharrin Niels Helveg Petersen aftur til Danmarkar eftir stutta almenna vitjan í Føroyum, har hann hevur verið gestur hjá løgmanni, Edmundi Joensen.

Endamálið við vitjanini var at styrkja samskiftið millum uttanríkisráðið og Føroyar, soleiðis at skilja, at føroyingar frá nú av eisini skulu sleppa at vera við til fyrireikingarnar av uttanlandsviðurskiftum, ið hava við Fæøoyar gera, kunnu sleppa framat við sínum viðmerkingum til slíkar spurningar.

Í tí sambandinum hava partarnir gjørt av at seta eina 6-mannanevnd á embætisstøði, sum eisini løgtingið í fjør í mai samtykti skuldi gerast.

## Trý og trý

Tey, sum skulu leiða embltisnevndina verða eitt umboð fyri uttanríkisráðið og eitt fyri landsstýrið, og vera tey ávíkavist fulltrúin Henrik Wøhlk og løgmansstjórin, Marjun Hanusardóttir sambært skrivinum, sum sent er út eftir fundin millum uttanríkisráðharran og løgmann í gjár.

Umframt teir seks nevndarlimirnar, sum uttanríkisráðharrin og løgmaður hvør í sínum lagi velur trý umboð í, skulu eisini varalimir setast. Haraftrat hevur embætismannanevndin loyvi at útvega sær neyðugan sakkunnleika í ávísum málum, har tað verður hildið vera neyðugt.

## Fyrireikingar gerast

Uppgávan hjá nevndini verður at viðgera núverandi og framtíðar mál í uttanríkishøpi, ið øll skulu hava tilknýti til ríkisfelagsskapin landanna millum. Av serligum týdningi verða sjálvandi mál, ið hava við Føroyar at gera á ein ella annan hátt og at fáa hesi sjónarmið viðgjørd so tíðliga sum gjørligt, áðrenn møguligar samráðingar um hesi somu skulu leggjast fyri donsku stjórnina.

Haraftrat verður álagt nevndini at fyrireika nevndarfundirnar, sum eina ella tvær ferðir um árið skulu vera, antin teir verða í Danmark ella í Føroyum.

Embætismannanevndin, sum sett verður, hevur einki við aðrar nevndir, hvørki núverandi uttanlandasnevndina ella aðrir slíkar at gera.

Fyribils avtalan um 6-mannaðu embætismannanevndina skal galda í tvey ár. Tá verður málið um framhald av henni tikið uppaftur upp aftur til nýggja viðgerð, og um hon møguliga skal halda fram ella hvør lagna hennara verður.



**Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharri, saman við løgmanni Edmundi Joensen, øðrumegin, og ríkisumboðsmanninum, Vibeke Larsen, hinumegin.** *Mynd: Kalmar Lindenskov*



**Uttanríkisráðharrin Niels Helveg Petersen er eins og løgmaður Edmund Joensen spentur uppá úrslitið av fundinum um marknatrætuna millum Føroyar og Bretland í næsta mánaði.** *Mynd: Kalmar Lindenskov*

# Marknatrætan kanska avgerast í Haag

**Fundur millum umboð fyri danska og bretska uttanríkisráðið verður 2. apríl. Kunnu partarnir ikki semjast nú ella innan hálvt ár, skal málið avgerast við havrættardómstólin í Hollandi, sigur løgmaður Edmund Joensen.**

Beate L. Jensen

Meðan uttanríkisráðharrin Helveg Petersen hevur verið í Føroyum, er hann sjálvsagt ikki sloppin undan at verða mintur á fundin, sum vera skal millum donsku og eingilsku stjórnini um marknalinjuna millum Bretland iog Føroyar.

Hetta er fyri okkum eitt sera stórt og týdningarmikið mál. Tað tykist tað eisini vera fyri bretar, sum sjálvsagt hava sama áhuga í spurninginum sum vit.

Olja er vorðin til okkara sokallaða -havsins gull-, ið stríðið fevnir um. Finst oljan hesu- ella hinumegin markið. Sjálvandi vilja vit hava sum mest burturúr, serliga nú, ið aftur ein nýggj oljukelda er funnin á Hetlandsleiðini.

## Eingilskmenn boðið til fundar

Allir teir fundir, sum verið hava partanna millum hava ikki givið nakað gott úrslit fyri okkara viðkomandi.

Eingilskmenn eru teir sterku í so máta, men eisini uttanríkisráðið vil hava eina endaliga avgerð í marknatrætuna millum Føroyar og Bretland, tí vit hoyra hóast alt til Danmark í einum góðum og tøttum ríkisfelagsskapi!

Fundur um marknatrætuna millum okkum og eingilskmenn er settur at fram í Bretlandi 2. apríl, og eru tað eingilskmenn, ið hava tikið stig til júst hendan fundin.

## Loysnin hevur skund

Uttanríkisráðharrin Niels Helveg Petersen vónar, at ein loysn fæst á marknatrætuni á fundinum hesaferð, men fæst hann ikki, er hann samdur við løgmann Edmund Joensen um, at so skal ein avgerð fyriliggja, áðrenn hálvt ár er farið aftur um bak. Er eingin semja ella eingin loysn funnin til ta tíð, verður farið til havrættardómstólin í Haag í Hollandi. Hetta er sjálvandi tað seinasta, sum partarnir ynskja. Men tað kann gerast neyðugt, semjast vit ikki um hetta mál, sum hevur við uttanríkispolitikk at gera.

# Framtíð í pelagiskum fiski

**Við góðum sambandi í uttanríkisráðnum kunnu føroyingar fáa lættari atgongd til eystureuropeisku londini og marknaðin har. Londini eystanfyri eru eldhugað at gerast limir í ES. Vestureuropa vil fegið hava tey við, tí marknaðarmøguleikarnir eystureftir metast stórir í framtíðini, vil uttanríkisráðharrin Niels Helveg Petersen, sum fór aftur til Danmarkar í gjár, vera við.**

Beate L. Jensen

Meðan uttanríkisráðharrin Niels Helveg Petersen hevur vitjað í Føroyum síðani týsdagin, hevur hann hitt umboð fyri vinnulívið.

Eingin ivi er um, at ein høvuðstáttur hjá føroyska vinnulívinum í løtuni er framtíðarsamband okkara við ES- londini.

Vit eru ikki limir í ES, men Danmark er tað. Ikki er tí løgið, at onnur ES-lond ikki dáma, at vit, sum ikki- limir lættliga hava atgongd til ES-marknaðin við vørum okkara, sum vit kunnu slúsa inn á lógligan hátt um Danmark, England og Skotland, og víðari suðureftir.

Um 80 pst. av útflutningi okkara, tað er fyri tað mesta fiskur, verður seldur á ES- marknaðinum. Tí er avgerandi neyðugt at hava góð handilsviðurskifti við henda felagsskap, um vit framhaldandi ætla okkum at vera uttanfyri ES.

## Handilsavtalur eystureftir

Í slíkum sambandi hevur tað stóran týdning, at vit við hjálp frá uttanríkisráðnum fáa eina góða handilsavtalu, at vit framvegis kunnu halda tann standard innan útflutning og handil, sum vit hava, og helst betra hann.

Eystureuropeisku londini eru hugað at gerast limir í ES. Tað skilja vit væl! Hinvegin er vestureuropeiski hugurin at fáa góðar handilsavtalur í lag við júst hesi somu lond umframt tey baltisku londini eisini sera stórur. Og har kunnu vit sleppa uppí part, um so er, vit gjøgnum uttanríkisráðið kunnu gera okkum galdandi.

## ES-umboðsmaðurin

Serliga kundi verði hent hjá okkum at fingið góðar handilsavtalur m.a. í sambandi við pelagiskan fisk eystureftir.

Fyri at hjálpa eitt sindur um trupulleikan hevur løgtingi játtað pening til ein føroyskan ES-umboðsmann, sum skal halda til á belgisku sendistovuni í Keypmannahavn ella kanska tí donsku í Belgia, - men bert í eitt hálvt ár.

Eisini verjupolitikkurin hjá okkum er felags við hin danska. Vit hava ikki hernaðarskyldu. Skuldi tað óhugnaliga hent, at eitt fremmant land framdi álop á okkum, høvdu vit ikki verið nógv verd, um vit ikki høvdu onkran at vart okkum, og tá kemur Nato sera væl við. Har er Danmark limur.

## Søgufrøðingur setast

Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharri, segði á tíðindafundi í gjára morgunin, at ein søgufrøðingur skal setast at kanna viðurskiftini, sum vóru galdandi í Føroyum undir sokallaða Kalda krígnum, eins og tað hevur verið gjørt í Grønlandi.

Nakað fyri miðdag í gjár fór uttanríkisráðharrin við tyrluni úr Havn til flogvøllin í Vágum og víðari til Danmarkar við Atlantic Airways.

Vitjan hansara á hesum sinni var av.

